Dimmalætting

Stovnað 1878
Ábyrgdarblaðstjóri
Beate L. Samuelsen
Blaðstjóri
Georg L. Petersen
Útgevari
P/F Dimmalætting
Prent Dimmalætting

AVGREIÐSLA: Mánad. til hósd. kl. 8.00-17.00. Fríggjad. kl. 8.00-16.00. Leygard. stongt. Tlf.-avgreiðsla kl. 8.00-16.00. Tlf. 311212. Fax 310941. Smyrilsvegur 13, Postboks 19, FO-110 Tórshavn.
e-mail: redaktion@dimma.fo, prent@dimma.fo, lysing@dimma.fo, haldari@dimma.fo, bokhald@dimma.fo, kronikk@dimma.fo, vidskerin@dimma.fo

INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR

	Týsdagsblaðið	Mikudagsblaðið	Hósdagsblaðið	Fríggjadagsblaðið	Leygardagsblaðið
Størri lýsingar	frí. kl. 12	mán. kl. 12	týs. kl. 12	mik. kl. 12	hós. kl. 12
2 tg. tekstlýsingar	má. kl. 10	týs. kl. 10	mik. kl. 10	hós. kl. 10	frí. kl. 10
Okkara Gulu	frí. kl. 15		týs. kl. 15		hós. kl. 15

Lýsingar, ið nógv arbeiði er av, mugu vera inni í góðari tíð.
Litlýsingar og lýsingar við framhjáplássi skulu bileggjast í góðari tíð.

Vanligar treytir: Síðustødd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4.160 mm. Útsjónd: Lýsingar, sum eftir blaðsins meti kunnu mistakast fyri blaðtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður roknað uppí lýsingarmatið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru.

Fyrivarni: Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi løgum. Ábyrgdina fyri hesum hevur lýsarin. Blaðið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum blaðið metir óynsktar.

Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at blaðið má tilskila sær rætt til at

1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkir.
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað. Litlýsingar kunnu bert takast við, um teknisku viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavsláttur eftir blaðsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella líknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vanaligum lýsingartilfari hevur blaðið onga ábyrgd av.

Lýsingar, sum verða inntelefoneraðar, verða altíð lisnar uppaftur, og blaðið tekur tí onga ábyrgd fyri villur, sum kunnu henda hátt.

Alternativir møguleikar lítið virdir

AT vit eiga nógv gott skilafólk og fólk, sum veruliga vilja nakað, er einki at taka seg aftur í.

Og hví skuldu vit ikki eisini átt fólk, sum skara framúr, tá ið um hugskot ræður? Tað kann ikki bera til, at bert eitt ella tvey flogvit við snildargávum verða fødd í heiminum hvørja øld.

Nøkur fá við slíkum evnum munnu helst detta burtur ímillum tí tey ikki verða vird í tí umhvørvi, tey vaksa upp í, tí samfelagið ikki dugir at virðismeta hesi, ja, so verða tey rópt serlingar ella kanska svøk - tey passa ikki inn í heildarmyndina.

Vit hava ikki pláss fyri teimum, sum er, tí vit ikki eru von at hava tílík fólk ímillum okkum. Kanska tí tey eru so fá og skilja seg burturúr mongdini.

Hvussu skal ein menniskja, sum rúmar so nógvar framúr gávur, ið teirra nærmastu ikki duga at taka ímóti og harvið ikki virðismeta, kunna halda fram við sínum tankum, tá stoytt verður ímóti alla staðni?

Við hesum verður hugsað um tey flogvit, sum Føroyar í veruleikanum eiga og sum liggja inni við nógvum frálíkum hugskotum, sum tey sjálvi ikki megna at føra út í lívið.

Skuldi tað hent seg, at tað kom alment fram, at tey hava putlað við okkurt serligt heima við hús og gjørt sær eina hugmynd av onkrum, sum hent kann verða í tí dagliga, ja, so er ikki lætt at fáa at vita, hvar tey skulu fara, hvar tey skulu venda sær fyri at fáa stuðul fyri at halda fram við hesum hugskoti. Tvørligt er at fáa at vita frá myndugleikunum, hvar tey kunnu fáa meiri vitan um hetta sama uttan júst at sita innikleimd á einum bókasavni og lesa um evnið. Illa gongst somuleiðis hjá teimum at frætta, hvar tey kunnu fáa fíggjarligan stuðul til at framleiða hugskotið, um so er, at ein framleiðsla kann koma uppá tal.

Fleiri føroyingar eru, sum hava uppfunnið ymiskt ella sum við gransking eru komnir so mikið langt, at navn teirra eisini er kent úti í heimi. Tað er ein sera tung leið at ganga, tí tú ert ofta noyddur at satsa, og tað í sjálvum sær er ein forðing fyri at menna teg víðari í tí, sum tú ert í gongd við. Ið hvussu er seinkar hetta munandi tínum virksemi, og tú sessast aftur fyri líka sum at vissa teg um, um hetta nú er rætt ella skeivt.

Skulu vit bert dúva uppá fiskivinnuna sum einastu inntøku føroyinga umframt at skeita eitt sindur yvir á oljuvinnuna, sum bæði tvey eru sera óálítandi, er neyðugt at hugsa øðrvísi, hvussu vit kunnu menna samfelag okkara.

Eitt er heilt vist, rýkur ríkisfelagsskapurin, gerast vit illa fyri, og tá kundi verið hent, at tey, sum liggja inni við mongum frálíkum hugskotum, fingu ta hjálp, teimum nýtist, og at tey fingu nærri at vita um møguleikarnar fyri framleiðslu. Ikki minst, hvussu hetta skal fíggjast.

Men tað man ikki verða nakar trupulleiki hjá samgonguni. Har gongur sum smurt, tá tað snýr seg um pengar.

Andlát

†

Jóhannes av Skarði
fyrrverandi háskúlakennari

andaðist sunnudagin 24. januar 1999,
87 ára gamalur.

Farið verður úr Landsjúkrahúskapellinum mikudagin 27. januar kl. 16. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin 28. januar kl. 14.

Familjunnar vegna
Paulina

Tøkkir

Tøkk

Hjartaliga takk tit øll, ið á ymiskan hátt mintust og gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum.
Gott nyggjár øll somul

Nicolina og Poul



Mentamaður farin

Sunnudagin 24. januar andaðist Jóhannes av Skarði, fyrrv. fólkaháskúlalærari, 87 ára gamal.

Joannes var føddur í Havn 7. apríl 1911, sonur háskúlahjúnini Sannu og Símun av Skarði, hon av Húsum í Havn, hann av Skarði. Joannes gekk á Føroya Fólkaháskúla veturin 1925-26 og var síðan í handverkslæru í trý ár. Í 1929-30 var hann í Noregi; fyrru helvtina av tíðini arbeiddi hann á bóndagarði, seinnu var hann á Voss Folkehøgskule. Tók í 1932 preliminerprógv frá Høng Eksamenskursus í Danmark og studentsprógv frá Høng Gymnasium í 1934. Var stud. polit. á lærda háskúlanum í Keypmannahavn 1934-38 og kom so heim til Føroya og gjørdist hjálparlærari á Føroya Fólkaháskúla 1938-42, stjóri á sama skúla 1942-52, og aftur lærari 1953-76.

Joannes hevði farloyvi frá skúlanum 1972-73. Hetta árið var hann í Íslandi, har hann tók sær náðir at fáast við orðabókaarbeiði og annað skrivligt. Ferðaðist um Ísland og kom har í samband við fólkið og lærdi tess mentan at kenna. Hesa tíðina nýtti hann eisini høvi at fara til fyrilestrar á lærda háskúlanum í Reykjavík.

Eftir munnligari frásøgn savnaði og skrivaði Jóannes upp orð og orðafelli og tilfar viðvíkjandi gomlum føroyskum arbeiðslagi og gamlari føroyskari amboðsmentan. Eitt úrslit av hesum savningararbeiði sæst í ritgerðunum: »Føroyski leypurin« (Fróðskaparrit, 4.-5. bók), »Eitt sindur um bjargarøkt í Skúvoy« (Varðin, 37. bind) og »Faroese Cultivation and the Peat Spade« (í The Spade in Northern and Atlantic Europe, Belfast 1970). Hann skrivaði bóklingarnar »Føroyskur orðalisti« til Otto Jespersen: Engelsk begynderbog 1, 1956, og »Úr fyrisitingar- og skrivstovumáli« (í røðini Føroyskt orðatilfar, bind 1), 1960. Í 1967 kom »Donsk-føroysk orðabók«. So eru tær triggjar ritgerðirnar: »Føroya Fólkaháskúli 1899-1949« (í 50 ára minningarriti skúlans saman við Rasmusi Rasmussen) 1949; »Fólkaháskúlin« (Varðin, 32. bind) og »Jólafundurin« (Varðin, 36. bind). Týðingar í bókaformi: Carl Larsson í By: »Verja og vaka og aðrar søgur«, 1952; Albert Camus: »Fremmandamaðurin«, 1968. Hann týddi framhaldssøgur í ritunum Alduni 1941 og Glugganum 1955-58. So kom – eftir donskum handriti hjá R. K. Rasmussen lækna – »Gomul føroysk heimaráð«, 1959, »Ensk-føroysk orðabók«, 1984, og týðingin »Kalevala, tjóðkvæði finna«, 1993.

Jóannes av Skarði fekk fyri mikla mentanarstarv sítt ymiskar almennar viðurkenningar: navnabót sum heiðursdoktari við Fróðskaparsetur Føroya, sømdargávu úr Grunni Kristjans á Brekkumørk og finska stjórnin heiðraði hann við medalju fyri týðing sína av Kalevala.

Konu hevði Jóannes úr Sandvík, Paulinu, f. Berg. Og tey fingu børnini Símun, Hans Jákup, Sonnu og Aleksandru.

PáK

Tillukku við barninum

Hvønn leygardag ynskir Dimmalætting foreldrum tillukku við lítla barninum, annaðhvørt bara í teksti ella í teksti og myndum. Hetta gera foreldrini sjálvi av. Send brævbjálvan til Dimmalætting, postboks 19, 110 Tórshavn merkt »Tillukku við barninum«, skriva avsendara, navn og adressu, so vit kunnu senda myndina aftur sum skjótast. Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi fríggjamorgun. Um foreldrini ynskja tað, kann myndafólk frá blaðnum taka myndina ókeypis. Ring 311212, og vit avtala nærri.



Orðið

Les 2 Kongabók 18v1-4

KOPARORMURIN

(Ezekias) muldi koparormin í mjøl; tí... Ísraelsmenn høvdu brent roykilsi fyri honum. 2 Kongabók 18v4

UM RÆÐUR, at vit eru støðugt á vakt, so at ongin lutur, fólk ella sjálvsstremban tekur pláss Guds í lívi okkara og tískil gerast tilbiðjunarevni. Hjá ísraelsmonnum gjørdist koparormurin vandamálið.

Gud hevði álagt Mósesi at gera koparorm og festa hann á steyra, so at ein og hvør, sum hugdi á honum, varð grøddur eftir drepandi bit av oyðumarkarormi. Tá ið vandin var yvirstaðin, varðveitti fólkið ormin sum áminning um ongantíð aftur at gera uppreistur. Í roynd og veru var hann eitt minni um náði Guds og miskunn. Men fólk fóru so við og við trúgva, at ormurin átti yvirnáttúrligan mátt, og brendu tí roykilsi fyri honum. Hann fekk heitið Nehustan, sum heilt einfalt merkir »koparormur«. Hetta var avgudadýrkan; og tí forkom Ezekias honum.

Fáur man nú á døgum kanna einum metalluti gandamagn. Kortini lúrir framvegis vandin, at vit skapa okkum avgudar eins og ísraelsmenn, tá vit loyva onkrum hugfarsligum at kappast við Gud um tíð okkara og tráan. Eitt nú ítróttur og ítriv kunnu gera seg inn á uppiborna rúm Guds við at ræna tíðina frá okkum. Ja, sjálvt starv okkara kann gerast ein avgudadýrkan. Alt, sum fer við hugsanum okkara kann gerast ein avgudadýrkan. Alt, sum fer við hugsanum okkara ella peningi, so at Gud kemur í aðru røð, er ein Nehustan. Annaðhvørt mugu vit halda slíkt á rímiligum støði ella eiga vit at kvitta við tað. Eins og hjá Ezekiasi má Gud fáa aðalplássið © -prp-

Brøv til Dimmalætting

Hví ikki siga og skriva — í staðin fyri

Hví ikki siga og skriva	í staðin fyri
ein avgerð	ein beslutningur
at krevja	at forlanga
ein søga	ein historia
nú	pá núverandi tíðspunkt
beint nú	pá inniverandi tíðspunkt
í løtuni	
tagnaskylda	tavsheitsplikt
standa sína roynd	standa sín prøva
eg skal royna	eg skal prøva
sum frá líður	pá langt sikt
hava varhuga av	hava intrykk av
	hava fornemilsi av
gonguteigur	fótgangarayvirgangari
gongubreyt	fortov
kanning, gransking	research

Málhugaður

Dimmalætting
– góður lesnaður

Rætting

Av misgáum var ein setningur dottin uppí millum í Viðmerkingini »At leita eftir ósemjum« - 3. partur, sum Trygvi Guttesen hevði í Dimmalætting leygardagin 23. januar.

Vit endurgeva tí niðanfyri brotið, sum hevur við horvna setningin at gera.

- Samstarvið innan verandi ríkiseind hevur ikki altíð verið líka gott, men orsøkin til tað liggur valla bara hjá tí eina partinum.

Onkur hevur samanborið slíkt samstarv við eitt hjúnaband, ið bæði kann vera gott og minni gott.

Men tú finnur neyvan eitt hjúnaband, ið er so gott, at ein kreppa als ongantíð íkemur, og í okkara føri, har hjúnabandið hevur vart í 600 ár, er ikki so løgið, at ávís kreppa íkom - her verður hugsað um bankamálið - **Ein kreppa, sum báðir partar helst vildu verið fyri uttan, sum báðir partar hava lært nógv av, og sum valla kann koma fyri aftur.**

Blstj.

Ússaligt innbrot

Synd at siga, at teir, sum sunnunáttina brutu inn í Mimir í Havn, gjørdust sørt ríkari.

Teir funnu bara 3-400 krónur í vekslipengum og fýra pakkar av sigarettum.